

# Drotningin seksti ár

**KONGSHÚSIÐ.** Í morgin verður drotningin hjá føroyingum seksti ár, og nógv verður gjørt burtur úr degnum í Danmark

Í morgin verður Drotning Margrehta II seksti ár, og nógv verður gjørt burtur úr degnum í Danmark.

Upphitingin til stóra dagin hevur verið long, og eisini føroyska sjónvarpið hevur onkur sending verið at sæð við drotningini.

Og bæði í ÚF og SvF, kunnu føroyingar fylgja við føðingardegnum hjá royala yvirhøvdinum, um teir ætla tað. Longu sunnumorgunin kl. 9.45 – tað er eit tíð, tá SvF bara plagar at tendra skíggjan fyri Formel 1 koyring – fer SvF undir at samsenda við danska sjónvarpið.

Sent verður millum annað frá gudstænastu í Christiansborg Slottkirkju, og meginpartin av sunnudegnum eru ymsar sendingar við drotningini á skránni.

Longu leygarkvøldið byrjar hátíðarhaldið í SvF, tá sent verður frá einum tíðindafundi við Margrethu.

Í skránni hjá ÚF eru eisini fleiri sendingar frá føðingardegnum á skránni.

**Skal vera drotning hjá føroyska fullveldinum**

Drotningin, sum eisini er drotning hjá føroyingum, hevur verið royalt yvirhøvd síðani 15. januar 1972, tá hon tók við eftir pápa sín, Fríðrik tann 9.

Margretha drotning hevur vitjað í Føroyum umleið fimta hvør ár síðani.

Seinasta ferðin hjá Margrethu til Føroya var í 1995, og í summar kemur hon á stutta vitjan í sambandi við at 1000 ára haldið fyri kristnanini av Føroyum

Sjálvstýrissamgongan, sum ætlar at fáa fullveldið, hevur ongar ætlanir at siga Margrethu drotning upp. Í sáttmálauppskotinum, sum landsstýrið legði fyri donsku stjórnina, verður skotið upp, at danski monarkurin framhaldandi verður drotning ella kongur hjá føroyingum.

**Eg meini tað**

*Vegna forfall er teigurin »Eg meini tað« ikki vð í 2'aranum hesaferð.*

**OMANBREKKA.** Fyrrverandi danski landsliðsspælarin í fótbólti, Lars Elstrup, var mánadagin handtikin av løgregluni, eftir at hann hevði gjørt um seg í miðbýnum í Odense

# EM-hetja í hondjørn

*Eyðun Klakstein*

Fyri átta árum síðani átti hann ein avgerandi fót í størsta sigrinum hjá danska fótbóltslandsliðnum nakrantíð.

Mánadagin handtók løgreglan mannin, eftir at hann hevði gjørt ónáðir og rópt ókvæmisorð eftir fólki í miðbýnum í Odense.

Maðurin er Lars Elstrup. Fyrrverandi fótbóltsstjørna, men nú mest kendur fyri sín løgna atburð uttanfyri fótbóltsvøllin.

Lars Elstrup skoraði avgerandi málið í dystinum móti Fraklandi undir EM í 1992, sum Danmark heilt óvænta vann.

Men seinni rýmdi hann úr fótbóltsheiminum og búsetti seg í einum kollektivi á Fjóni, har ein átrúnaðarlig sekt, Wild Goose Company, heldur til.

Hetta var fyri næstan seks árum síðani, men fyrr í ár rýmdi hann frá sektini, og í donsku fjølmiðlunum greiddi hann frá síni avgerð og segði annars frá, hví hann hann hevði uppført seg, sum hann hevði gjørt.

Hann vónaði tá, at hann aftur kundi liva eitt vanligt lív.

**Stórur hávi**

Gamla felagið hjá Elstrup, OB, rætti honum eina hjálpandi hond og bjóðaði honum aftur í felagið.

Hesum tilboði tók Elstrup av, og hann fór at venja saman við superligahópinum hjá OB. Hesum høvdu donsku fjølmiðlarnir so stóran áhuga fyri, at Elstrup helt, at hann átti at fáa pengar frá OB fyri at gera so nógva reklamu fyri felagnum.

Hetta var ein av orsøkunum til, at Elstrup varð settur á dyr í OB. Hann var ringur at hava við at gera, og leiðsluni í OB dámdi ikki atburðin hjá Elstrup.

Men tað, sum seinastu seks árini hevur líkst eini ferð omanbrekku, tók meira skap sum ein sorgarleikur, tá Elstrup í vikuni varð handtikin av løgregluni.

Orsøkin til hetta var, at Elstrup gjørdi ónáðir á gongugøtuni í Odense. Elstrup gav fólki, sum kom fram við, fingurin, og hann rópti eftir og gjørdi seg inn á fólk.

Orðini, sum Elstrup rópti eftir fólki, vóru ikki av teimum vakrastu, og hvørki menn ella kvinnur sluppu undan.



**Fyrrverandi landsliðsspælarin í fótbólti, Lars Elstrup, verður lagdur í hondjørn á gongugøtuni í Odense mánadagin**

**Í hondjørn**

Hesin atburður stóð við í tveir tímar, og tá kom harðskapur eisini uppí.

Elstrup gav einum ungum manni eitt ordans slag, eftir at maðurin og onkur vinmaður hjá honum høvdu kjakast ógvusliga við Elstrup.

- Um tit ikki sleppa tykkum avstað, drepi eg tykkum, skal Elstrup hava rópt.

Hetta fekk fýra vaktarmenn í einum handli at leggja uppí, men tað gjørdi bara ilt verri.

Stutt eftir kom løgreglan á staðið, men tað endaði við, at Elstrup gjørdist í øðini, og hann fór at berjast við tveir løgreglumenn, sum fingu hann í hondjørn og koyrdu hann á løgreglustøðina, haðani hann varð leyslatin hálvantriðja tíma seinni.

Eftir tilburðin fekk danska avísin Ekstra-Blaðið orðið á Elstrup, sum greiddi frá, at hann varð ikki ørur í høvdinum. Hann hevði bara hug at liva lívið, og gera tað, sum hann hevði hug til.

- Eg leggi einki í, at summi fólk halda meg vera sjúkan, og tey halda, eg skuldi verið innlagdur. Kanska skuldu tey hugsa um sítt egna lív, tí onkur av teimum hevur helst brúk fyri at verða innlagdur, segði Elstrup millum annað við blaðið

**Skal leggjast inn**

Liðfelagar frá tí tiltikna EM-liðnum stúra fyri Elstrup. Ekstrablaðið hevur tosað við fleiri av teimum, og Ricard Møller Nielsen, sum var venjari hjá danska landsliðnum undir EM í 1992, fer so langt sum at siga, at Elstrup skuldi verið tvingsilsinnlagdur.

- Eg vóni, at læknar og sálarlæknar kunnu hjálpa honum, tí tað tykist, um tað er heilt galið við honum. Eg eri skelkaður av atburðinum hjá honum, og eg eri keddur um, at vit ikki hjálptu honum meira, tá hann kom í samband við sektina, sigur Ricard Møller Nielsen.

- Tá sektin fekk fatur á honum, endaði tað rættiliga galið. Nú haldi eg, at hann skal innleggjast, og gjarna við tvang, tí hann er sjúkur.

Liðfelagararnir Lars Olsen, Henrik Larsen og John Faxe Jensen eru ikki so avgjørdir, men teir siga seg verða keddir av at síggja støðuna hjá Elstrup.

- Men um hann vil liva lívið, soleiðis sum hann gera nú, skal hann hava loyvi til tað, sigur John Faxe Jensen.

**Tíðindablaðið Sosialurin**. **Postadressa:** Postboks 76, 110 Tórshavn. **Telefon:** 311820. **Telefax:** 314720.
**Email til 2'aran:** eydun@sosialurin.fo. **Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller. **Blaðstjórn:** Eyðun Klakstein.
**Layout og uppseting:** Tíðindablaðið Sosialurin.



# Vónir um gull í altjóða hornblásturskapping

**HORN.** Treytað av, at nóg mikið av peningi fæst til vega til ferðina, ætlar Faroe Brass at luttaka í europeiska meistaraskapinum fyri hornblástur í Birmingham



**Steven R. Foggin er hugtikin av Føroyum og føroyingum, og tók av, tá honum stóð í boði at virka sum tónleikalærari á Tvøroyri. Mynd: D. Olsen**

*Dagfinn Olsen*

Steven R. Foggin er ikki í iva um, at sleppur Faroe Brass til Birmingham at luttaka í Europa meistaraskapinum fyri hornblástur, so eru góðir møguleikar at koma heim við góðum úrsliti. Kanska enntá gullinum, tí tveir av dyggast kappingarneytunum hjá føroyingum eru ikki við í ár.

Men skoðbráið er stutt og enn fløðir ikki í kassanum hjá Faroe Brass, hóast nógv brøv eru farin út, har søkt verður um stuðul til ferðina. Longu 26. apríl skal ferðalagið ,úr Vágum, um tað eydnast at skava pening saman til ferðina.

**Tónleik alt lívið**

Steven R. Foggin er tónleikalærari á Tvøroyri. Hann er føddur í Bristol í Onglandi, men hevur livað meginpartin av lívinum í London. Alt lív sítt hevur hann fingist við tónleik. Hann vaks upp í Frelsunarherinum og seinni gjørdist hann soldátur, guard. Tað eru teir við stóru svørtu húgvunum.

Seinni hevur hann stjórnað og undirvíst í tónleiki.

Steven var fyrstuferð í Føroyum longu í 1987. Tá luttók hann á Jazzfestivalinum. Honum dámdi væl land og fólk, ið tóktust blíð og fyrikomandi.

Tá hann fyri góðum ári síðani fekk boðið starv sum tónleikalærari á Tvøroyri, tók hann av, og hevur enn ikki angrað.

**Hava spælt inn fløgu**

Tá Steven fekk tilboð um at taka sær av føroyska tjóðhornorkestrinum, Faroe Brass, tók hann av.

Tað er hetta orkestur, sum nú hevur fingið tilboð um at luttaka í European Championship í hornblástri. Orkestrið er sett saman av limum úr øllum 8 hornorkestrum í landinum.

Faroe Brass hevur fyri stuttum spælt inn eina fløgu, ið ikki skal gevast út, men sum hevur til endamáls at lata áhugað sleppa at hoyra orkestrið. Ein sonevnd promotion fløga.

Eingin verður vístur burtur, men endamálið við Faroe Brass er at fáa bestu tónleikararnar við og at geva føroyskum hornblásarum best møguligar umstøður og møguleikar. Í orkestrinum leika bæði yngri og eldri leikarar og tónleikalærarar.

Faroe Brass hevur verið til í huganum á fleiri í áravís, men ikki fyrr enn til síðstu hornorkesturstevnu gjørdist orkestrið veruleiki.

**Venjingin**

Steven Foggin sigur, at enn er venjingin nakað spjødd. Leikararnir hittast einaferð um mánaðin. Oftast í Havn, men eisini aðrastaðni.

Grundleggjandi er, at hornorkesturlívið, sum vit kenna tað, ikki skal órógvast av Faroe Brass. Tí hevur orkestrið bert einar 5 uppgávur árliga.

Øll arbeiðsmegin í bólkinum verður gjørd ókeypis og av áhuga.

**Hvør fær stuðul?**

European Brass Band Championship í Birmingham er tann týdningarmesta kappingin av sínum slag í heiminum.

Steven er sostatt ivaleysur í, at hetta er áhugaverd innbjóðing, sum nú stendur Faroe Brass í boði.

Steven Foggin sigur, at sum ein, ið kemur inn í føroyska samfelagið, er hann bilsin yvir, hvussu trupult tað er at fáa stuðul til slíka tónleikaferð.

Hann samanber við t.d. fótbólt og leggur dent á, at sllík tónleikaumboðan er altjóða umboðan.

Hann er eisini ivaleysur í, at møguleikarnir eru góðir at koma heim við gullinum. Tveir av dyggastu kappingarneytunum hava boðað frá, at teir luttaka ikki í ár.

Men hóast tað styttist, til ferðalagið uppá 35 skal avstað til Birmingham, so eru vónirnar góðar.

Steven sigur, at hetta at finna stuðul til ferðina er ein avbjóðing og allar avbjóðingar hava svar.

Higartil hevur Faroe Brass fingið stuðul frá Norðurlandahúsinum, Musikkskúlanum og frá hornorkestrunum. Tey eru takksom fyri stuðulin, men ásanna, at neyðugt er við styrki frá fyritøkum og vinnulívi.

Steven Foggin sigur, at leikararnir longu hava goldið nógv úr egnum lumma og hugsar hann her m.a. um venjingarnar, ið tey ferðast til úr øllum landinum.

**Íblástur**

Eisini leggur hann dent á dygdina í Faroe Brass, har tveir av ungu leikarunum hava fingið innbjóðing at luttaka í European Youth Band. Hetta er fyri ungar leikarar undir 22 ár. Innbjóðingin er komin í samband við luttøkuna í kappingini í Birmingham.

Um tað eydnast Faroe Brass at koma til kappingina í Birmingham er enn ikki víst, men víst er tað, at slík ferð hevði verið mennandi og til íblásturs fyri leikararnar.